# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at høgt elskaða mamma, omma, langomma og vermóðir okkara

**Petra Samuelsen**

andaðist 22. februar, 97 ára gomul.

Bønarhald verður mikudagin kl. 18 á kapellinum í Landssjúkrahúsinum.

Gravarferðin verður hósdagin 26. februar kl. 14 úr Dómkirkjuni.

*Vegna tey avvarðandi*
**Hjørdis, Elsuba, Sigrun og Heðin**

**Brúdleyp**
Flaggdagin 25. apríl giftast Annika Soll, Sørvágur, og Sámal Kristian Jacobsen, Tórshavn. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 14.00 og veitsla fyri innbodnum verður í Eydnuni á Oyrarbakka kl. 19.00.

**Konfirmantar í Kaldbaks kirkju sunnudagin 29. mars kl. 12.00**
Teitur í Sjúrðagarði, ovast á Gørðum 27, Kalbak
Anna Randi Hansen, inni á Fløtum 17, Kalbak

**Konfirmantar í Havnar kirkju sunnudagin 29. mars 2009 kl. 11.00**
Monika Andreasen, Sámalsgøta 2
Borgar Debes, Yviri við Strond 79A
Linda Nielsen, Fútalág 20
Silja Jovina Danielsen, J. Nolsøes Gøta 30
Armgarð Gundardóttir Mortensen, Brattabrekka 11
Símun Højgaard Lützen, Tinghúsvegur 36
Rannvá Djurhuus Carlsson, Klokkaragøta 15
Beinta Sofia Edvardsdóttir, í Lágni 23
Margreta Eyðunsdóttir Samuelsen, Skørugøta 8
Barbara Gaardlykke Apol, Niels Finsensgøta 45
Magnus Dam Jacobsen, Posthúskjallarin í Tórsgøtu
Dagmar Johannesen, Pætursgøta 24
Símun Johannesen, Pætursgøta 24
Karin Salberg Olsen, Villingardalsvegur 38
Fríði Mellemgaard, Mækjugøta 9
Sverri Skaalum Joensen, C. Pløyensgøta 15
Paula Einarsdóttir Olsen, Smærugøta 10

**Dagurin**
**23. mars. Fidelis.** Sigst at vera halgimenni, sum varð tikið av døgum í Afriku í 5. øld, men annars vita teir einki um hann. Fidelis merkir tann trúfasti. Rasmus Effersøe doyði hendan dagin í 1916, og Regin Dahl doyði hendan dagin í 2007.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Minningarorð um Árna Debess

**f. 20. juni 1961 - d. 23. febr. 2009**



Nú várið er í hondum, og náttúran vaknar úr sínum vetrardvala, fór mín góði vinur og arbeiðsfelagið Árni Debes so brádliga um sýn, bert 47 ára gamal.

Árni silgdi mong ár í Grønlandi við reiðarínum Qajaq Trawl, sum hevur rækjutrolara. Har kom eg at sigla saman við Árna frá 1996 til 2006.

Sigast kann um hann, at hann var ein sera dugnaligur og nærlagdur maskinmaður, og var væl egnaður at hava høvuðsábyrgd av øllum tí tekniska á einum stórum nútíðar rækjutrolara.

Árni var ein stilførur maður, men kundi eisini vera skemtingarsamur og dugdi væl at taka til.

Hann tosaði mangan um síni kæru heima, og børnini stóðu hansara hjarta serliga nær.

Hann hevði stóran áhuga í øllum, sum rørist í náttúrini. Dámdi væl at takast við seyð, sum hann, saman við familjuni hevði í haga, stiki og í feitilendi.

Eg kann í takksemi líta aftur á tíðina saman við Árna. Eisini teir mongu túrarnar, tá vit høvdu konurnar og børnini á vitjan, tá vit vóru á verft í Danmark og í Íslandi. Her blivu knýtt vinarbond, sum vit eru sera glað fyri.

Góða Carol, Rúnar, Sára, foreldrini Anni og Hans, verforeldur, systkin og øll tit, sum stóðu honum nær.

Má Harrin stykrja tykkum, nú tit so brádliga blivu rakt av stórari sorg.

Við hesum fáu orðum vil eg lýsa frið yvir minni um mín vin Árna Debess.

**Sámal Petur**

# Komið og syngið við!

Heimaforbundið hjá Frelsunarherinum skipar hóskvøldið 26. mars kl. 20 fyri einum sonevndum syngið við kvøldi fyri at savna pening inn til Bangladesh, har stórur dentur verður lagdur á at hjálpa familjum har møður og børn liva av skøkjuvirksemi fyri at fáa sína inntøku. Endamálið er at fyrubyrgja barnaprostitatión og minka um HIV og Aids, sum er ein stórur trupulleiki har.

Árni og Marnar Andreasen koma at syngja sangir av teirra stuðulsfølgu, og Maria í Ullvøruhúsinum kemur eisini at syngja.




*Hóskvøldið kl. 20 verður syngið við kvøld í Frelsunarherinum í Havn*

# Mentanartiltak á Eysturoyar Røktar-og ellisheimi

Í sambandi við at 25 ár eru liðin síðan Eysturoyar Røktar- og ellisheim varð tikið í nýtslu, verður skipað fyri fleiri ymiskum almennum mentanartiltøkum á heiminum.

Fyrsta tiltakið verður týsdagin 24. mars kl. 19.30 í samkomuhøllini. Kingobólkurin úr Tjørnuvík syngur, og Martin Restorff Jacobsen, prestur, heldur fyrilestur undir heitinum "Guðs rødd á mannatungu."

Aftaná verður kaffi í matarsalinum.



*Kingobólkurin úr Tjørnuvík syngur á mentanartiltakinum týskvøldið*